# Høvdið kann skapa ein vinnara

**Fyri fullum sali mikukvøldið helt danin Arne Nielsson ein avbera lívligan og læruríkan fyrilestur fyri ítróttarfólkum, venjarum og felagsleiðslum. Øll fóru avstað aftur eitt sindur ríkari, enn tá tey komu, men spurningurin er, hvussu mong tóku hansara orð veruliga til eftirtektar og fara at royna at liva eftir teimum**

FYRILESTUR
*Solby A. Eliasen*



*Arne Nielsson og Guttormur Sørensen. Nógv ítróttarfólk nýttu høvi til at lurta eftir tí lívliga og serstakliga dugnaliga fyrilestrarhaldaranum. Øll lótu væl at aftaná*

*Mynd: Gunnar Nolsøe*

**Klaksvík:** Til vanliga føroyska tíð, tað vil siga fimtan minuttir ov seint kundi stjórin í Norðoya Sparikassa, Eyðfinn Reyðberg bjóða vælkomin til tey mongu, sum vóru komin til fyrilestur hjá Arne Nielsson.

Mong mundu tey verða, sum hugsaðu sítt, tá stjórin segði, at fyrilesturin kom at vara í tríggjar tímar, men um nakar hugsaði nakað ilt ella ikki, so vórðu allir tankar gjørdir til skammar, tá danin fór í gongd.

Lívliga og vælformuleraður fangaði hann hvørt eitt oyra í salinum og greiddi við ítøkiligum dømum frá, hvussu ein kann gera fyri at økja um møguleikarnar at náa sínum máli. Ella gerast ein vinnari – tað veri seg ítróttarliga, arbeiðsliga ella heima. Arne leggur stóran dent á, at størsti parturin av einum avriki liggur í høvdinum á tí einstaka ella liðinum. Um ein ikki hevur rætta hugburðin, so er ikki so nógv at gera, heldur hann. Men tað ber til sambært honum at læra seg at hugsa rættari.

Hann legði út við at biðja øll gera eina lítla roynd. Tað var nakað so einfalt sum at leggja saman hendur mótsattan veg, sum tey eru von. Og hetta vakti eitt sindur av látri, tí sum vera man, so var tað ikki so lætt. Tað kravdi at ein hugsaði seg um áðrenn. Og uppaftur verri bleiv tað so, tá hann bað øll gera tað í eini knappari handavending.

Á henda hátt megnaði hann longu frá byrjan at gera øllum greitt, at ein vanabroyting er ikki bara sum at siga tað.

Arne tosaði millum annað um danska orðatakið: Tab og vind med samme sind.

– Tað ber ikki til, staðfesti hann.

– Um ein hevur vunnið, so fær ein eyka orku við fagnaðinum, og tá ein hevur tapt, so er ongin fagnaður og sostatt heldur ongin orka. Ein er keddur av, at tað gekk, sum tað gekk, so tað ber ikki til at siga soleiðis og liva eftir tí, segði Arne Nielsson og var skjótur at leggja afturat, at tað helst hevur verið ein tapari, sum er komin við hasum orðatakinum. Arne tosaði um at finna tann rætta hugsunarháttin. Hann segði, at fyrst og fremst hevur fagnaður nógv at siga. Tað at kunna vísa, at ein er glaður og somuleiðis rósa og fagna øðrum, tá tað gongur væl. At vera líka skjótur at rósa sum at gera vart við mistøk.

## YES!

Slagorðið fyri kvøldið bleiv eitt hart YES róp, sum tað eydnaðist honum at fáa øll, sum tilstaðar vóru at rópa.

Og her eiga áhoyrararnir rós. Føroyingar bera orð fyri at vera heldur torførir at hava við at gera, tá tað kemur til teirra egnu luttøku í tílíkum, men hetta kvøldið lá teirra partur so sanniliga ikki eftir.

Men um tað vóru áhoyrararnir sum vóru lǽttir at hava við at gera ella bara tað, at tey vóru sum voks í hondunum á Arne, skal her vera ósagt. Men sannleikin er, at tá 20 minuttir vóru farnir av fyrilestrinum stóðu øll uppi og róptu sítt fyrsta sannførandi YES, meðan tey kreptu armin og háláðu hann av øllum alvi til sín og annað beinið var uppifrá. Og soleiðis helt hann fram fleiri ferðir við at fáa áhoyrararnar við.

## Hugsa málrættað

Arne vísti ferð eftir ferð gjøgnum fyrilesturin á, at tað sum vit eru bangin fyri sum oftast hendir. Hann greiddi frá, at um ein, óansæð hvat ein skal gera, hugsar frammanundan: Bara tað nú ikki miseydnast. Bara eg ikki skjóti við síðuna av ella okkurt líknandi, so hendir tað ofta.

– Heilin tekur ikki dagar í millum hatta ikki, sum vit ofta hava lyndi til at seta inn í okkara tankar, og júst tí hendir tað, sum vit ikki vilja hava at henda, segði hann og legði afturat, at ein skal hugsa um tað, sum ein vil hava henda ístaðin fyri tað, sum ein er bangin fyri fer at henda. Og tað er lættari sagt enn gjørt, tað vísti royndin við at leggja saman hendur øllum.

Hann hevði eina talvu, har ein strika var beint tvørtur um miðjuna. Og hesa strikuna nýtti hann til at vísa, at um ein er oman fyri hana, so er ein væl fyri. Tað er teir góðu dagarnir, har ein hevur viðvind og hugsar positivt. Men er ein hinvegin undir strikuni, so er talan um tað mótsatta.

– Vit koma øll fyrr ella seinni undir strikuna, tað slepst ikki undan, men so ræður tað um at arbeiða seg skjótt upp aftur.

Arne Nielsson nýtti ítøkilig dømi í sínum fyrilestri út frá egnum royndum sum kano-rógvari. Men hann segði fleiri ferðir, at av teimum umleið 60 fólkunum, sum vóru tilstaðar, so kundi tað væntast, at bert eini 15 fóru at broytast eftir fyrilesturin. Sum also fóru at fara heim og framyvir leggja hendur saman mótsattan veg.

Arne Nielsson er olympiskur vinnari í at rógva kano, hevur vunnið tíggju HM gullheiðursmerki umframt 70 DM heiti og má við sínum einans 60 kg sigast at vera ein avbera lítil kanorógvari. Í dag rør hann ikki longur, men ferðast hann runt og heldur fyrilestur út frá egnu royndum sínum. Fyri stuttum gav hann út bók í Danmark, og henda er sera vælmóttikin. Arne skal halda fyrilestur sín aftur hóskvøldið og fríggjakvøldið. Og sunnudagin gongur leiðin heimaftur til Danmarkar.



*Fótbóltsleikarar, rennarar, eldri sum ung, sjálvur stjórin í sparikassanum…øll reistust upp og róptu so hart YES, at tað dundraði eftirí. Stemningurin var sera góður millum áhoyrararnar, og nógvur látur var at hoyra*

*Mynd: Gunnar Nolsøe*

# ítróttur

Nr. 115 • leygardagur • 21. juni 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Í morgin verður føroyadagur í Parkini

**Møguleikin fyri at ein føroyskur spælari fyri triðju ferð nakrantíð skal vinna danska meistaraskapin í fótbólti verður mettur at vera rættuliga stórur**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*



*Onki er at ivast í, at fleiri føroysk fløgg verða at síggja í Parkini í morgin*

**SOSIALURIN-KEYPMANNAHAVN:** Á middegi í gjár vóru umleið tredivu túsund atgongumerki seld til uppgerðina í Parkini í morgin, tá ið FCK skal taka seinasta stigið á leiðini ímóti danska meistaraskapinum í fótbólti. Hesa ferð er pláss fyri 36 túsund og ikki 41 túsund. Tað kemst av, at teir í FCK undan mikudegnum høvdu selt atgongumerki uttan neyva stólamerking.

Í DBU rokna teir við, at tað verður FCK og ikki Brøndby, sum fer at vinna DM. DBU hevur gjørt av, at steypið og gullkrónurnar skulu vera í Parkini. Um tað verður Brøndby, sum verður meistari, og ikki FCK, so fáa teir í Brøndby gullið, tá ið teir koma aftur úr Silkeborg. Men tað verður altso roknað við, at FCK fer at vinna á AGF, og at DBU harvið fer at sleppa av við viðførið í Parkini.

Einki annað hevur verið at hoyrt, enn at Todi Jónsson verður millum teir fyrstu ellivu. Tað er rættuliga ivasamt, um Jørgen Pettersson verður tøkur, og Morten Bisgaard, sum mikukvøldið var á miðvøllinum í høgru, er orsaka av skaða rættuliga ivasamur. Um hann ikki verður tøkur, so fer málskjúttin mikukvøldið, Hjalte Nørregaard, sjálvandi at spæla í miðvallarplássinum í høgru.

## Tvær ferðir áður

At ein føroyingur skal vera á danska fótbóltsliðnum, sum undan síðsta umfarinum liggur best fyri at gerast meistari, er framúr. Um tað fer at eydnast hjá Toda Jónsson og liðfeløgunum at vinna DM, so verður tað kortini ikki fyrstu ferð, at ein føroyingur gerst danskur meistari í fótbólti. Veruleikin er tann, at tað í nýggja túsund árinum er vorðið regulin heldur enn undantakið, at føroyingar eiga lut í danska meistaraskapinum.

Í 2000 var Jákup Mikkelsen málverji hjá Herfølge, sum púra óvæntað vann DM. Málverjin varð mettur at eiga stóran lut í góða Herfølge avrikinum.

Í 2001 var Todi Jónsson á liðnum hjá FCK, sum vann DM. Hann var so mikið eyðsýndur, at Michael Laudrup, sum tá var hjálparvenjari hjá Morten Olsen á danska landsliðnum, staðfesti, at um Todi hevði verið danskari og ikki føroyingur, so hevði hann verið evni til álopspláss á danska landsliðnum.

Í fjør vann Brøndby DM. Tað gjørdu teir, tí teir í avgerandi uppgerðini ímóti FCK í Parkini í síðstu løtu javnaðu til 1-1. Tað var stórt vónbrot fyri FCK. Aftaná snúði mesta umrøðan í donsku pressuni seg um, at dómarin, Kim Milton Nielsen, ikki hevði bríkslað í tveimum støðum, tá ið Brøndby menninir heilt greitt høvdu gjørt brotsspark ímóti Toda Jónsson. Um FCK hevði havt fingið brotsspørkini og høvdu skorað, so høvdu tað verið teir og ikki Brøndby, sum høvdu vunnið DM. Í morgin hava Todi og liðfelagarnir nýggjan møguleika.

# Farum hevur fingið nýggjan málverja

**Møguleikin hjá Jákupi Mikkelsen at flyta til felagið norðan fyri Keypmannahavn hvarv hósdagin**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

**SOSIALURIN-KEYPMANNAHAVN:** Jákup Mikkelsen spøkir í Farum. Tað var ein av yvirskriftunum í blaðnum fyrr í vikuni. Tíðindini vóru umvegis bold.dk komin úr Noregi, har eitt av bløðunum í Molde økinum segði seg vita hetta fyri vist.

Hósdagin bórust onnur fótbóltstíðindi í danska høvuðsstaðnum, sum rættuliga sannlíkt hava við sær, at Jákup Mikkelsen ikki verður nýggjur málverji í Farum.

DR1 visti hóskvøldið at siga, at Farum hevur skrivað sáttmála við Jan Hoffmann, sum er 32 ára gamal og harvið javngamal við Jákup Mikkelsen. Hesin Jan Hoffmann hevur higartil verið málverji í AB. Inntil fyri einum stórum ári síðani var hann sjálvsagdur millum stólparnar hvørja ferð, og møguleikin varð mettur at vera stórur fyri, at hann fór at fáa møguleikan sum triði danski málverjin - aftaná Thomas Sørensen og Peter Kjær - í HM endaspælinum, sum síðsta summar var í Japan og Suðurkorea.

Men so varð Jan Hoffmann eitt sindur skaddur, og AB keypti liðfelagan hjá Óla Johannesen í Hvidovre. Hann eitur Stephan Andersen, sum var málverji á U-21 landsliðnum. Jan Hoffmann vann ongantíð plássið millum AB stólparnar aftur, og nú hevur hann funnið sær annað arbeiðspláss, har sannlíkið verður mett stórt fyri, at hann fer at spæla hvørja ferð. Tað verður tað, tí hvørgin av teimum báðum, sum seinasta kappingarárið hava kappast um plássið í Farum málinum, fara at halda fram í felagnum.

At Farum valdi sær Jan Hoffmann framum kanska Jákup Mikkelsen og aðrar kemst fyrst og fremst av venjaranum. Christian Andersen, sum nú er venjari í Farum, hevur verið venjari í AB. Hann helt nógv av Jan Hoffmann, sum undir hansara leiðslu átti fast pláss millum stólparnar hvørja ferð.

## Tvey mál framvegis tóm

Pláss millum stólparnar í stórum feløgum hanga ikki á trøunum, um tað ber til at brúka ta vendingina. Eitt nú í FCK og Brøndby hava teir fleiri dýrar málverjar. Tað er ikki so langt síðani, at OB málverjin, Karim Zasa, varð mettur sum ein tann besti í Danmark. Eftir summarfrítíðina skal hann spæla við Brøndby. Spurningurin er kortini, um hann fer at megna at sleppa upp í part ímillum teir bestu. Síðani Mogens Krogh gavst á nýggjárinum, hevur Claus Ankergreen, sum teir ikki rættuliga roknaðu við í Brøndby, havt møguleikan at vísa, hvør dugur er í honum, og hann hevur tikið av.

Í FCK var svenski landsliðsmálverjin Magnus Kihlsted fyrsti málverji í fjør. Tað gekk eitt sindur upp og niður hjá honum, og tí fekk Rune Pedersen møguleikan. Saman við Toda Jónsson var hann ein av teimum, sum ikki vildi skriva undir nýggjan sáttmála við FCK. Hann flutti til Italia, men har hevur tað ikki hilnast væl, og fyrr í hesi vikuni varð Rune Pedersen nevndur sum møguligur nýggjur málverji í Farum. Nú er tann møguleikin burtur, og tí má Rune Pedersen roknast sum møguligt málmansevni í feløgunum, sum framvegis ikki hava gjørt av, hvør skal hava ta uppgávuna hjá teimum.

FCK keypti í fjør ungverska málverjan Raboczki, og hann hevur staðið í málinum, meðan Kihlsted hevur sitið á beinkinum. Soleiðis var uppgávubýtið teirra millum eisini í Brøndby mikukvøldið.

Føroyskir fótbóltsfjepparar vóna, at Jákup Mikkelsen fer at fáa møguleikan at verja málið í onkrum felag á høgum støði. Sambært Rudi Voller, týska landsliðsvenjaranum, so er Jákup Mikkelsen nóg góður at vera málverji í týsku bundesliguni og alla aðra staðni, sum hann málbar seg á tíðindafundinum aftaná landsdystin næstsíðsta mikukvøld.

Jákup Mikkelsen hevur sjálvur sagt, at hann avgjørt einki hevði havt ímóti at spælt í donskum felag. Tí er upplagt at skatta dýpið, hvussu tað stendur til við málverjum í superliguni. Har er skjótt at staðfesta, at tvey mál standa tóm. Talan er um málið hjá AGF, har 40 ára gamli fyrsti málverjin, Erik Bøje, hevur lagt handskarnar á hillina, og í FCM, har Peter Skov Jensen, sum nú er annar málverji á danska landsliðnum, ikki hevur viljað skrivað undir nýggjan sáttmála. Hann droymir um at spæla aðra staðni enn í Danmark.

Donsku feløgini hava ikki viljað skrivað nýggjar sáttmálar, áðrenn kappingarárið hevur verið av, og tað hevur verið greitt, um tey fóru at varðveita plássið í bestu deildini ella ikki. Nú er greitt, hvør skal spæla hvar eftir stutta summarsteðgin. Tí kann roknast við, at tað heilt skjótt verður greitt, um dreymurin hjá Jákupi Mikkelsen aftur at spæla í Danmark, verður veruleiki ella ikki.